Uttan úr HEIMI

Skjótt sjey børn í húsinum
Kendi sjónleikarin er ein veruligur familjumaður. Seinni í hesum mánaðinum er kona hansara, **Robyn**, setti til at eiga sjeynda barnið hjá parinum.
Mel Gibson sigur tó, at graviditeturin hjá konuni var óvæntaður, tí sum hann sigur, so helt hann, at hann "kundi skjóta mál, uttan at tað fekk nakrar avleiðingar."
43 ára gamli **Mel Gibson** hevur tó einki ímóti at fáa enn ein arving, og sjálvur er hann eisini vanur við stórar familjur. Hann hevur ikki færri enn tíggju systkin. Aðrenn nýggja barnið er komið í verðina, eiga **Mel Gibson** og **Robyn** fimm dreingir og eina gentu.

Courtney Cox spæla sálarfroðingur
Tann 35 ára gamla sjónvarpsstjørnan **Courtney Cox**, ið vit kenna sum **Monicu** í sendiroðini **Vinir**, fer nú at innspæla eina komediu úr sálarfroðisheiminum. Mótspælari hennara verður drongurin hjá henni, 27 ára gamli **David Arquette.**
Í filminum **The Shrink** skal **Courtney Cox** spæla eina kvinnu, sum sigur seg at verða sálarfroðing. Hon gerst góð við ein av sjúklingum sínum, men so hvørt vísir tað seg, at heldur ikki sjúklingurin spælir við opnum kortum.
Innspælingarnar av filminum skulu eftir ætlan byrja 19 apríl, og seinni í summar skulu **Cox** og **Arquette** aftur spæla ein film saman, tá ið upptøkurnar til **Scream 3** byrja.

Black Sabbath upploysist
Royndu rokkararnir í **Black Sabbath** hava nú avgjørt at pakka saman eftir eina miseydnaða roynd upp á eitt come-back.
Ozzy Osbourne og restin av upprunamanningini í **kultbólkinum Black Sabbath** gevast endaligt, tá ið teirra konsertferð **"The Last Supper"**, sum byrjar í Florida í maj mánaða, kemur at enda.
Bretski bólkurin gav í 1998 út fløguna **Reunion,** sum var ein liður í royndini at gera eitt ordans come-back. Ein stórur partur av konsertunum, sum bólkurin skuldi hava í sambandi við fløguna, blivu tó avlýstar, tí at sangarin, **Ozzy Osbourne,** hevði trupulleikar við røddini.

Amerikansk rappstjørna dripin
Løgreglan í **New York** leitar eftir tí ella teimum, sum drupu rapparan **Freaky Tah** úr kenda bólkinum **Lost Boyz**. Tann 28 ára gamli **Freaky Tah**, sum í veruleikanum æt **Raymond Rogers**, bleiv dripin sunnumorgunin, tá ið hann var á veg til húsa eftir eina veitslu í býarpartinum **Queens** í **New York.**
Rogers bleiv skotin í høvdið av einum manni í einari sokallaðari finlandshúgvu, tá ið hann kom út av gistingarhúsinum, har sum veitslan var. Hann var beinan vegin sendur á sjúkrahús, men var deyður, áðrenn sjúkrabilurin kom fram.

FILM TOPP 3

1. Shakespeare in love
2. Patch Adams
3. Ronin

3´arin CD-ROM TOPP 10

1. Championship Manager 3
2. Sim City 3000
3. Turok 2
4. Heroes of might and magic 3
5. Baldurs Gate
6. Delta Force
7. Half Life
8. Alpha Century
9. Fallout 2
10. Grand Theft Auto

FLØGUR Topp 20

FC-Búðin

1. **Toto**: Mindfields
2. **Ymisk:** The all time greatest rock songs
3. **Dr. Bombay**: Rice and Curry
4. **Ymisk:** No Stress
5. **The Offspring:** Americana
6. **Britney Spears:** Baby one more time
7. **Ymisk:** X-treme big hits 98
8. **Roxette:** Have a nice day
9. **Ymisk:** Country for lovers
10. **Emilie:** Big Big World
11. **BeeGees:** The very best of
12. **The Goo Goo Dolls:** Dizzy up the girl
13. **Frændur:** Svart Gull
14. **Cher:** Greatest Hits
15. **Metallica:** Garage Inc.
16. **Billy Joel:** Greatest Hits I & II
17. **Phil Collins:** Hits
18. **Modern Talking**: Alone
19. **Whitney Houston**: My love is your love
20. **Garth Brooks:** Double Live

3´arin í SMS

1. **Ymisk:** No Stress
2. **Ymisk:** All time greatest rock songs
3. **Britney Spears:** Baby one more time
4. **Jóannes Jakobsen**: Myrkursins gongumenn
5. **Ymisk:** Sov blítt og søtt
6. **Metallica:** Garage Inc
7. **Toto:** Mindfields
8. **Ymisk:** Big Hits 1998
9. **Offspring:** Americana
10. **Jessica:** Jessica
11. **Modern Talking:** Alone
12. **Smokie:** The Complete Collection
13. **Millum Frændur:** Kærleikans Vallaraheim
14. **Astral Projection:** Another World
15. **B. B. King:** His Definetive Collection
16. **Dr. Bombay:** Rice and Curry
17. **Roxette:** Have a nice day
18. **Pink Floyd:** The Wall
19. **Ymisk:** Abs. Let's dance 23
20. **E-Type:** The Explorer

CD-ROM TOPP 10 FC-Búðin

1. Championship Manager 3
2. Heroes of might and magic 3
3. Barbie Modedesigner 2
4. Alpha Century
5. Grand Theft Auto
6. Half Life
7. Fallout 2
8. Sim City 3000
9. Baldurs Gate
10. Delta Force

Blaðstjórn:
Terji Nielsen.
Tlf.: 31 18 20
Fax. 31 47 20
e-mail:
yngd@sosialurin.fo
og
terji@post.olivant.fo
Útg.: Sosialurin

VIDEO TOPP 10

1. Seks dage og syv nætter
2. Sliding Doors
3. Godzilla
4. Kodenavn Mercury
5. Fix og færdig
6. City of Angels
7. Wild Things
8. She's so lovely
9. The wedding singer
10. Gingerbread man